## Hótta við hevnd

Í Teilandi hóttir ein muslimskur felagsskapur við hevndaratsóknum, eftir at 78 muslimar doyðu í einum samanbresti við løgregluna og herin mánadagin. Teilendsku myndugleikarnir hava viðgingið, at løgreglan og herurin fóru alt ov illa við muslimunum, og Thaksin Shinawatra, forsætisráðharri, segði fyrradagin, at myndugleikarnir høvdu framt mistøk, sum hann málbar seg.

Muslinmski felagsskapurin Pulo kunngjørdi í gjár, at hann fer at hevna harðskapin hjá herinum og løgregluni. Vit fara at søkja at høvuðsstaðnum Bangkok, og vit fara at seta eld á býin, stóð í kunngerðini hjá felagsskapinum.

Muslimskir leiðarar í Teilandi bera ótta fyri, at harðskapurin hjá myndugleikunum fer at elva til ófrið í teimum landspørtunum, har teir flestu muslimarnir búgva. Støðan í hesum landspørtunum hevur verið spent leingi, og higartil í ár hava umleið 400 fólk latið lív í samanbrestum, skrivar Reuter.

## Dýrt kríggj

Vinnur George W. Bush forsetavalið í næstu viku, fer hann væntandi at biðja Kongressina um 75 milliardir dollarar afturat til krígigð í Irak og Afganistan umframt tað, sum longu er játtað á fíggjarlógini.

Ovastin í amerikonsku herleiðsluni, Peter Shoemaker, generalur, sigur við CNN, at herurin fær brúk fyri umleið 40 milliardum dollarum afturat tí, sum stendur á fíggjarlógini. Men hetta er ikki alt. Keldur í Hvítu Húsunum hava sagt, at stjórnin er í ferð við at kanna, hvussu stórari eykajáttan tørvur er á, men at kanningin er ikki liðug.

Júst tann ovurstóra penganýtslan til kríggið í Irak hevur verið eitt av høvuðsmálunum í valstríðnum upp undir forsetavalið. John Kerry hevur roynt at vísa á, at kríggið var ikki neyðugt, og at teir nógvu pengarnir áttu heldur at verið brúktir til heilsuverkið og skúlaverkið í USA. Bush sigur harafturímóti, at kríggið í Irak er ein partur av bardaganum ímóti yvirgangi og tí neyðugt.

## Grashoppukríggj

Herfyri oyðiløgdu grashoppur ein stóran part av grøðini í fleiri londum í útnyrðingspartinum av Afrika. Eitt nú oyðiløgdu tær umleið 40 prosent av allari grøðini í Mauritania, og nú stúra myndugleikarnir í Marokko fyri, at tað sama skal henda har.

Í seinastuni hava sjáldsama nógvar grashoppur verið at sæð í býunum Agadir, Tiznit og Tafaout har suðuri í Marokko. Býirnir eru í tí týdningarmesta landbúnaðarøkinum í landinum, haðani umleið tveir triðingar av landsins grønmeti kemur. Myndugleikarnir hava nú játt-að einar 300 milliónir krónur til bardagan ímóti grashoppunum í ár, og teir ætla at brúka líka nógvar penar næsta ár til endamálið.

Matvørustovnurin hjá ST, FAO, sigur, at grashoppurnar hava verið sjáldsama nógvar í ár orsakað av áhaldandi regni í fjør. Sambært FAO etur ein grashoppa dagliga líka nógv, sum hon vigar, og tá hon kann flúgva einar 200 kilomerar um dagin, kunnu grashoppur oyðileggja stór landbúnaðarøki eftir stuttari tíð.

## Ítróttarhetja í rættinum

Fyrrverandi finski skíðhopparin Matti Nykænen mátti fyrradagin í rættin í Tammerfors, tí hann er skuldsettur fyri morðroynd. Verður hann funnin sekur, kann hann fáa upp í 35 ára fongsul.

Tann 24. august tók løgreglan í Tammerfors Matti Nykænen og skuldsetti hann fyri at hava roynt at beina fyri einum øðrum manni. Teir báðir høvdu saman við øðrum verið og hugnað sær í einum summarhúsum. Teir høvdu fingið í meira lagi at drekka. Um náttina rættu Matti Nykænen og ein av monnunum tong, og tá Nykænen tapti, gjørdist hann frá sær sjálvum og leyp á hin mannin við knívi og stakk hann í ryggin og nakkan. Á rættarfundinum fyrradagin segði Nykænen, at hann mntist einki av tí, sum hendi. Kanningar hjá løgregluni vístu, at hann hevði 3,4 promillu av alkoholi í blóðinum, tá hann bleiv tikin.

Matti Nykænen er ein tann størsta ítróttarhetjan, Finnland hevur havt. Fýra ferðir vann hann heimsmeistaraheitið í skíðlopi, og hann var tann fyrsti, sum vann trý gullmerki í einari olympiskari vetrarkapping.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Arafat illa sjúkur

**Eitt lið av útlendskum læknum kom í gjár til Ramallah at kanna palestinska forsetan, sum er illa sjúkur**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 75 ára gamli Yasser Arafat hevur verið sjúkur seinastu fjúrtan dagarnar. Talsmenn hansara hava sagt, at hann leið av einari magapínu, men fyrrakvøldið versnaði hann so nógv, at hann lá uttan vit eina løtu.

Stutt eftir vórðu boð send eftir fleiri av teimum ovastu palestinsku leiðarunum, teirra millum Ahmed Qurie, forsætisráðharra og Mahmoud Abbas, fyrrverandi forsætisráðharra. Samstundis savnaðust fleiri hundrað fólk uttan fyri húsini í Ramallah, har ísraelski herurin hevur havt Arafat innibyrgdan seinastu tvey árini.

Arabiska sjónvarpið al-Jazeera segði gjáramorgunin, at Arafat hevði tilnevnt Qurie, Abbas og tjóðartingsformannin Salim al-Zaanoun at umsita forsetaembætið, meðan hann er sjúkur, men tað avsannaðu palestinskir embætismenn seinni.

Fleiri gitingar hava verið um, hvat bagir Arafat. Ísraelskir talsmenn hava róð uppundir, at hann líðir av krabbameini í maganum ella í hálsinum, men tað hava palestinar avsannað. Í gjár kom eitt lið av læknum úr USA, Egyptalandi og Jordan til Ramallah at kanna Arafat.

Ísraelski uttanríkisráðharin, Silvan Shalom, segði við ísraelska útvarpið gjáramorgunin, at Arafat fær frítt at fara, noyðist hann á sjúkrahús. Men tað er ivasamt, um palestinski forsetin fer at taka av tilboðnum. Ísraelskar keldur hava fyrr bent á, at fer Arafat úr teimum hersettu økjunum, sleppur hann ikki heimaftur.

Reuter tíðindastovan skrivar, at noyðist Arafat frá, ella doyr hann, fer tað uttan iva at ávirka viðurskiftini í Miðeystri. Bæði Ísrael og USA leggja Arafat undir at forða fyri friði ímillum ísraelsmenn og palestinar, og eygleiðarar halda tí, at tað verður lættari at fáa samráðingar í lag, um Arafat fer frá ella doyr.



*Tann 75 ára gamli Yasser Arafat hevur verið ímyndin av stríðnum fyri einum sjálvsstøðugum palestinskum ríki*
*Mynd: Reuters*

# Rimmar mentanarkvøld í Keypmannahavn

**Leygarkvøldið, 30. oktober, skipar flogbóltsdeildin hjá ÍF Føroyar fyri fjølbroyttum mentanarkvøldi**

TÍÐINDASKRIV

Tiltakið verður í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. , og verður lagt fyri kl. 17 við fótbólti, tá dysturin millum FC Nordsjælland og FC Keypmannahavn verður sýndur. Ikki minst verður tað her spennandi at síggja, hvørt tað loksins fer at eydnast Christian Andersen at fáa hevnd mótvegis Flemming Østergaard nú fleiri av stríðsmálunum teirra millum hava verið alment frammi.

Fótbólturin er av kl. 19, og kl. 20 verður so ferðast yvir til tónleikin, tá Stanley Samuelsen fer á pallin. Umframt løg av fløgu hansara, Um eg kundi kvøði, verða eisini ensk og donsk løg av ymsum slag at hoyra.

Stanley verður á pallinum í einar tveir tímar, og so verður talan um føroyska mótasýning. Her verða klæði frá Sirri, Pau, Tøting, Elisabeth Kruse, Dudas Verden, Gunnhild Mørkøre, Marita Reinert, Anna Kristin Bæk og Vígdis Petersen at síggja. Væl kendi plátuvendarin, Eyðfinn Drewsen, fer at taka sær av tónleikinum til mótasýningina, og sjónleikarinnan, Gunnvá Zachariassen verður frásøgufólk.

Sum punktum fyri kvøldinum verður dansur frá kl. 23-04, og verður tað Revival, sum fara at spæl bæði nýtt, gott og gamalt.



*Stanley Samuelsen fer á pallin í Føroyahúsinum leygarkvøldið*

# Sá Jørðin soleiðis út?

**Titan er tann størsti mánin hjá gongustjørnuni Saturn, og kaningar av honum kunnu avdúka, hvussu lívið á Jørðini byrjaði**

RÚMDIN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ongantíð áður hevur eitt rúmdarfar verið so nær tí ovurstóra mánanum Titan sum mikudagin, tá amerikanskt-evropeiska rúmdarfarið Cassini-Huygens fleyg fram við honum í 1200 kilometra hædd. Hálvan annan tíma seinni komu tær fyrstu myndirnar niður á Jørðina.

Sambært granskarunum vísa myndirnar, at Titan líkist einari upprunaútgávu av Jørðini, soleiðis sum vísindin ímyndar sær hana. Titan er umleið líka gamal sum Jørðin, og hildið verður, at umstøðurnar har eru umleið tær somu, sum tá lívið byrjaði á Jørðini fyri umleið 4,5 milliardum árum síðani.

Granskararnir vænta sær sera nógv burtur úr kanningunum hjá Cassini-Huygens. Rúmdarfarið er útgjørt við radara og myndatólum, sum kunnu avdúka, hvat er undir skýlagnum, sum er rundan um Titan.

Uppaftur meiri fæst væntandi at vita, tá tann evropeiski parturin av farinum skal seta seg á Titan miðskeiðis í januar. Tá fáa granskararnir væntandi meiri at vita um atmosferuna kring mánan. Titan er tann støtrsti mánin í sólskipanini og tann einasti, sum hevur eina atmosferu.

Tann amerikanski parturin av rúmdarfarinum skal kanna allar teir 33 mánarnar hjá Saturn, og tey næstu fýra árini fer tað at flúgva 45 ferðir fram við Titan.



*Tann risastóri mánin Titan er kanska ein upprunaútgáva av Jørðini*
*Mynd: Reuters*




Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2005 er mánadagin 1. nov. 2004




**Í mars 2005 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist við óbroytt.**

**Hvítu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2005 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 660 í telefonbókini 2004,og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 93 01.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A) Standardlýsing ................................ kr. 700,00
(B) Innramming.................................... kr. 800,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) . kr. 25,00
(sí dømi á s. 658 í Telefonbókini 2004)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 659 í telefonbókini 2004, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo · www.gulu.fo · info@gulu.fo
FØROYA TELE